


# Johan Wilhem Restorff: Dirigeraði tjóðsangin fyrstu ferð

**Henda frásøgnin er um Johan William Resttorff, vanliga kallaður Jan. Hann var sonur Andreas W. Restorff og harvið abbasonur gamla Martin C. Restorff. Hann dirigeraði bert 20 gamal tjóðsangin fyrstu ferð, hann varð framførdur fyri 100 árum síðani. Jan doyði bert 37 ára gamal. Tað kann vera hóskandi at endurgeva tey minningarorð, sum júst Petur Alberg skrivað um vinmannin:**



ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo


Ikki rann tað mær í tankar hin dagin seinnapartin í januar 1925, tá eg segði vinmanni mínum Johan Restorff farvæl, at tað skuldi vera farvæl med alla. Hann skuldi fara til Keypmannahavnar at søkja sær heilsubót, og hann hevði sjálvur tær bestu vónir, so tyktist mær. Hann sá eisini so væl út og hevði ein ikki vitað tað, so skuldi ein ikki trú, at hann var sjúkur, men sum hann segði: Tað var høvdið sum ikki vildi blíva "heilt all right".

Sunnudagin 1. februar komu sorgarboðimi um, at hann var deyður! Tung, tung sorgarboð fyri konuna, hansara gomlu móðir og systkini og av røttum eisini sorgarboð til okkum, ið vóru bundnir at Johan við vinarbandi. Eg sakni hann óført, og tað er grátur í hjarta mínum, at eg ikki skal hitta hann aftur. Vit høvdu ofta so nógv saman, og tað var so frálíka vælgerandi at vita, at hann segði aldri annað enn hann meinti. Lítiðlátaður og friðarligur var hann altíð – ein góður kammeratur.

Og nú liggur hann lík. Okkara kæri Jan, sum so mangan hevur glett okkara hjørtur við sínum herliga sangi og sínum frálíka vakra fíolspæli. Røddin er brostin, og fingrarnir eru stívir og stirvdir. Tað er so sárt, so ilt at fata. Hvat deyðin tó er óendaliga hjartaleysur.



*Spælimenn frá 1918. F.v: Jan Restorff, Óla Jákup Hansen Maurentius og Hans við Stein. Teknað av William Heinesen*

### Loysti Bakar Hansen av sum dirigentur

Tankarnir renna aftur til tað vakra, ljósa várkvøld 5. apríl 1907, tá Johan stýrdi síni fyrstu konsert og reiggjaði taktstokkin fyri okkum sangarum bert 19 ára gamal. Ein frálík konsert var tað, og Johan og vit allir vóru so sjelaglaðir. Gamli bakar Hansen hevði sagt seg frá sum dirigentur, hann hevði baksað í mong Harrans ár, og nú var Johan kosin til dirigent. Eitt sindur bangin var hann í fyrstuni, men nú var hann fegin, at alt var gingið so sera væl.

Við íðni arbeiddi hann og innøvaði nýggjar sangir, og tað vardi ikki leingi, áðrenn sangfelagið Ljómur helt sína næstu konsert. Ein konsertin fylgdi aðrari. Johan var sálin í øllum og hevði nógv tað størsta arbeiði. Hann var altíð fyrsti maður at møta, og tó at hugurin ofta var vánaligur hjá mongum, so var tað sjáldan, at hann ilskaðist.

Í 1909 ella 10 fór hann avstað til Amerika, og tey 5 árini Johan var burtur, var lítil sangur í Havnar býi. Tá sást tað best, hvat hann var verdur. Hann var ikki meira enn komin uppá land, tá birti hann sangfelagið aftur við sama íðni og ikki minni kynstri enn áður, tí yviri í Amerika hevði hann verið limur av stórum sangfelag, og nú vórðu konsertir javnan hildnar. Umframt at Johan stýrdi sanginum, so hevði hann nógv annað at fáast við á konsertini. Hann sang solo, spældi 1. violin í strúkikvartettinini og mangt annað. Altíð hevði hann tað mesta stríðið.

Nú var hann vorðin sjúkur, høvdið skuldi hava hvíld, og tí orkaði hann ikki at fáast við sang og musik longur.....

Høvur hans hevur lagt seg til ta síðstu stóru hvíldina, tey ærligu bláu eyguni eru burtur, og skjótt siglir hann inni aftur á Havnar vág sum lík at verða jarðaður í tí lítla landinum, sum hann av hjartanum var so góður við, og her í tí lítla býinum, har flest øll vóru góð við hann.

Tað er ein yrking sum Johan Lie skrivði, tá hitt stóra tónaskaldið Halfdan Kjærulf var deyður. Tó at Johan Restorff ikki var víðagitin, men bert livdi sítt friðarliga beskeðna lív í okkara smáu korum, so haldi eg, at hetta ørindi hóskar so væl her:

*Nu Hjertet er brustent*
*og Sangen udrunden*
*Og Strengen ej mere*
*her klang,*
*Hin Leg over Lyren,*
*nu er den henrunden*
*Og standset den*
*livlige Sang.*
*Nu dagen er over*
*Og stille han sover.*


Opgaver til Harmonilæren af J. D. BONDESEN
Lærer ved Københavns Musikkonservatorium
København Det Nordiske Forlag

*Nótalæran hjá Jan við vakra innsigli hansara*



**Gravsteinurin:**

*Johan Wilhelm Restorff*
*f. 16. 10 1887 d. 1.2 1925*

*Kristina Restorff*
*f. 7.9 1886 d. 6.1.1964*




*Johan Wilhelm Restorff og konan Kristina Mortensen, ættað úr Øravík*



*Bent Restorff*



*...og beiggin Leivur Restorff*

### William Heinesen skrivaði m.a. um mammubeiggjan:

*Han spillede violin, havde en smuk baryton og var sjælen i mange musikforetagender, både sanglige og instrumentale. Fra min barndom husker jeg Johan, dengang vist 17-18 år gammel, dirigere et pigesangkor. Jeg selv var sammen med min broder Heine med i Jans sangforening. I 1918 planlagde vi tre programmet til en stor konsert, der foregik om natten i Frants bageri. Sødermans "Bondebrøllup" var hovednummeret, og den hyggelige og ungdommeligt sprudlende musik vil for mig altid være knyttet til erindringen om det natlige bageri med dets duft af wienerbrød og Johans drengeagtige musikalske iver.*

Jan giftist við Christinu Mortensen úr Øravík. Tey fingu tveir synir Bent og Leivur. Teir doyðu barnleysir.

Christina livdu rættuliga leingi. Hon kom at reka kondittaríið hjá Restorff, og hetta gjørdist hennara livibreyð.

### Næstu ferð

Næsta frásøgnin er um Poul Andreas Restorff, sum var beiggi Johan. Hann var eisini við til at framføra lagið til tjóðsangin fyrstu ferð 2. Jóladag 1907